GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

Rammusáttmáli – feskt kjøt

05. februar 2026

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

## Útbjóðandi stovnur

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
160 Argir
Telefonnummar: 352400
Kontaktpersónur: Hallur av Rana
www.gjaldstovan.fo

## 1. Inngangur til útboðsmannagongd

Gjaldstovan (eftir hetta "Útbjóðari") vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan at bjóða uppá at fáa rammusáttmála fyri Landssjúkrahúsið og Glasir til keyp av feskum kjøti.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Hetta útboðið inniheldur fylgjandi stig:

1. Útinnan av tilboði: Tilboðsgevari fyrireikar sítt tilboð við støði í útboðstilfarinum, og tilboð skal vera latið inn innan ásettu tilboðsfreist. Í hesum tíðarskeiði kann tilboðsgevari fáa fleiri upplýsingar við at seta skrivligar spurningar.
2. Meting av tilboðum: Útbjóðari letur upp og metir um, hvørt innkomin tilboð eru í samsvar við form- og minstukrøv. Eftir hetta verða innkomin tilboð mett í samsvar við ásettu tillutanartreytirnar.
3. Tillutan av sáttmála: Útbjóðari tekur avgerð um tillutan av sáttmála og kunnar tilboðsgevarum um avgerðina.

## 2. Útboðstilfar

Útboðstilfarið er sett saman av:

- Útbjóðingarskriv
- Vøruyvirlit
- Treytir
- Dømi um CSV-prísfílu

- Trú og heiður váttan.

Útboðstilfarið kann heintast á www.keypsportal.fo.

## 3. Praktiskir upplýsingar

### a. Spurningar

Tilboðsgevari hevur møguleikan fyri at fáa fleiri upplýsingar um útboðstilfarið við at seta skrivligar spurningar. Spurningar skulu vera á føroyskum og sendast til Hall av Rana á fylgjandi teldupost:

keypsportal@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir áðrenn hósdagin 05. Mars kl 12.00 verða svaraðir í seinasta lagi seks dagar fyri ásettu tilboðsfreist. Spurningar, ið eru settir eftir freistina fyri at seta spurningar, verða eisini svaraðir í seinasta lagi seks dagar innan ásettu tilboðsfreist, uttan so, at spurningurin er órímiliga tungførur at svara uppá. Spurningar, ið eru settir seinni enn seks dagar undan freistina fyri at lata inn tilboð, verða sannlíkt ikki svaraðir. Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Øll svar kunnu síggjast á www.keypsportal.fo í seinasta lagi 11. mars 2026.

### b. Vavið á útboði

Útboðið viðvíkur ynski um at gera rammusáttmála til keyp av feskum kjøti fyri Landssjúkrahúsið og Glasir. Rammusáttmálin skal eisini kunnu brúkast sum grundarlag fyri víðari samráðingar um sølu til aðrar almennar stovnar.

Keyp landsins førir eftirlit um stovnar fevndir av sáttmálanum fylgja hesum rammusáttmála, og Keyp landsins hevur tulkingarrætting, um stovnar landsins skulu keypa eftir sáttmálanum.

## 4. Tilboð

### a. Tilboðsfreist og adressa til innlating av tilboði

Tilboð skal latast inn talgilt til Keypsportalin á fylgjandi teldupostadressu: keypsportal@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt. Freistin at lata inn tilboð er: mikudagin 18. mars 2025 kl 12.

Tilboð, ið verða latin inn eftir hesa freist, verða ikki viðgjørd.

### b. Vøru mongd

Hvussu nógv fekst kjøt Landssjúkrahúsið og Glasir fara at keypa frameftir, hava vit ikki eitt neyvt boð á. Vit kunnu tó upplýsa, hvussu nógv var keypt í 2024, og vit ímynda okkum at mongdin verður tilsvarandi.

Víst verður til skjal, Vøruyvirlit – feskt kjøt

Í skjalinum "Vøruyvirlit – feskt kjøt" sæst hvat slag av vørum væntast kann, at stovnarnir keypa. Tað er ein listi yvir vørukeypið hjá Landssjúkrahúsinum og Glasir í 2024.

Vørukeypið skal síggjast sum eitt dømi um hvørjar vørur vit ynskja. Til ber at bjóða inn við aðrari vøru, men kravt verður, at góðskan er av líknandi góðsku sum tilvísingarvøran.

Tað slepst ikki undan, at fyritøkur hava einarætt til summi merkir og vørur, og kunnu tær frígevast frá rammusáttmálanum um tað verður mett neyðugt. Um veitari ikki fær veitt hesa vøru vegna støður við einkarætti verður tað ikki talt niður í vekttingini, um hetta er í avmarkaðan mun. Heitt verður á veitaran um at gera vart við monopolvørur, so tær møguliga kunnu rættast í útboðstilfarinum áðrenn freistin at lata tilboð inn er úti.

Sum meginregla skulu Landssjúkrahúsið og Glasir keypa í samsvar við rammusáttmálan. Hetta merkir, at stovnarnir ikki kunnu keypa vøruna frá øðrum veitara. Tað kann tó vera neyðugt at "frítt stilla" summar vørur og gera tað sjálvboðið um stovnarnir keypa vøruna í rammusáttmálanum. Hetta merkir, at um stovnur hevur tørv á aðrari vørur, sum er øðrvísi, so kann hann keypa hana annað stað. Stovnarnir kunnu ongantíð keypa somu vøru frá øðrum veitara. Dømi um tað kann vera um ein uppskrift krevur eitt ávíst slag av kjøti enn tað rammusáttmálin fevnir um.

Um ein veitari ikki kann bjóða alt tað feska kjøti okkum tørva, so kann dómsnevndin taka avgerð um at góðtaka tilboð, um tað er ein minni mongd av vøru sum manglar. Um ein vøra manglar, so vil Keyp landsins nýta tann prís, sum vit meta vit kunnu keypa hesa vøru annað stað tá vit uppgerða prísin fyri innkomin tilboð.

Ein veitari skal kunnu bjóða 95 prosent av vørunum í einum vørubólki.

### c. Frágreiðing um tilboð og prís

Tann prís sum veitarin ynskir at bjóða, skal upplýsast í arkinum "vøruyvirlit – feskt kjøt" – veitarin kann eisini lata tilboð á annað hátt um hann ynskir – men "vøruyvirlit – feskt kjøt" skal verða útfylt.

Av tí at Landssjúkrahúsið og Glasir hava eitt stórt innkeyp gjøgnum alt árið verður væntað, at veitarin ikki tekur fyri útkoyring. Men veitarin verður biðin um at upplýsa fraktprís fyri aðrar stovnar, sum hava hug at brúka rammusáttmálan.

Tilboð skal latast inn á føroyskum.

## d. Sáttmálalongd og prísvøkstur

Rammusáttmálin skal verða galdandi í 2 ár, og settur at byrja umleið 6. apríl 2026 eftir avtalu partanna millum.

Prísvøkstur verður loyvdur, um hann fylgir marknaðargongdini.

Triðja hvønn mánað skal veitarin fráboða prísbroytingar av vørunum og samlaða prísbroytingar fyri vørubólkin til stovnarnar og Keyp landsins. Veitarin skal tá skjalprógva at prísirnir fylgja marknaðargongdini. Um stovnarnir og Keyp landsins meta, at prísvøksturin er ov stórur og veitarin ikki megnar at grundgeva fyri honum, so kann Keyp landsins velja at uppsiga sáttmálan við 4 vikur freist og fara út í nýtt útboð.

## e. Góðska

Tað finst eitt stórt útboð av feskum kjøti av ymiskari góðsku og torført er hjá eini dómsnevnd at taka dagar millum góðskuna.

Fyri at gera tað einfalt, hava vit valt at upplýsa tað vøru, sum Landssjúkrahúsið og Glasir hava keypt í 2024. Henda "tilvísingar vøra" meta vit uppfyllir okkara góðskukrøv. Tilvísingar vøran hevur ikki fyrimun. Veitarin skal verða vælkomin at bjóða eina líknandi ella betur vøru.

Tað verður dómsnevndin sum tekur endaliga avgerð. Avgerðin um góðsku vil byggja á eina meting (subjektiva) frá dómsnevndini. Um ivi er um góðskan livir upp til tær ásetingarnar kravt verður, so kann dómsnevndin biðja um fleiri upplýsingar ella at biðja um at fáa vøruna til royndar. Um ein vøra verður mett ikki at verða egna, so verður hon ikki tikin við. Um ein ov stórur partur av vøru frá einum veitara manglar, antin tí tey ikki livi upp til góðskukrøvini ella tí veitarin ikki hevur bjóða vøruna fram, so kann dómsnevndin velja ikki at taka av tilboð frá tí veitara.

Tað kann eisini koma fyri, fyri at ein veitari bjóðar eina vøru, sum hevur hægri góðsku enn tilvísingar vøran. Tað gevur sum meginregla ikki fyrimun.

Tað er eitt krav, at tilboðsgevarin kann veita t.d. kjøtfars og ymiskar búffar eftir uppskrift frá køksleiðarunum á Landssjúkrahúsinum og á Glasi. Tað er eisini eitt krav, at tilboðsgevari kann skera sundur heil lambskrov eftir ávísing. Tað skal eisini vera møguligt at fáa útbeinað lambskjøt. Til malið kjøt og kjøtfars er krav, at feittinnihaldið er í mesta lagi 10-12%.

Krøv eru til kuldan við móttøku:

Hitin maks 5°C einki frávik
Fiskur maks 2°C einki frávik

Um vøran er vakumpakkað, skal dagmerking á vøruna.
Fylgiseðilin er váttan fyri framleiðsludegi.

Onnur krøv eru eisini fyri handfaring av matvørum, umhvørvi o.l. Meira kann lesast um tað í viðhefta skjalinum "Treytir."

## f. Goymsla

Tað er eitt krav at veitarin hevur vøruna á goymslu í Føroyum, soleiðis at leveringstíðin svarar til tað, sum er vanligt fyri vøru, sum er á goymslu í Føroyum.

## g. Rokningar og upplýsing

Stovnarnir og veitari samskifta beinleiðis. Stovnar rinda sjálvir fyri síni keyp. Tað er eitt krav, at stovnarnir fáa eina samlaða faktura eina ferð um vikuna fyri samlaða keypið tað vikuna. Keyp landsins á Gjaldstovuni hjálpir fegin, um ivamál eru.

Upplýsingar um rammusáttmálan við prís og treytum verður lagd út á keypsportal.fo – har bert stovnar landsins hava atgongd.

Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-sml format.

Tað er eitt krav, at LS kann fáa eina excel.csv-fílu við upplýsingum. Í fylgiskjalinum Dømi um CSV-prísfílu sæst, hvørjir upplýsingar skulu vera á fíluni. Tá broyting er í vøruni, t.d. broytt vekt, og onnur vøra kemur í staðin, skal nýggj prísfíla sendast til LS beinanvegin og nýggj vøra.

Útbjóðarin hevur heitt á teir stovnar sum keypa mest feskt kjøt um at luttaka í einari dómsnevnd. Í dómsnevndini sita Glasir, Landssjúkrahúsið og Keyp landsins.

## h. Uppsøgn av sáttmála

Sáttmálin kann altíð uppsigast við 3 mánaðar freist. Eru avbjóðingar í samstarvinum, so kunnu partarnir avtala styttri freist.

## i. Lata upplýsingar

Veitarin sum vinnur útboð, bindur seg til at lata Keyp landsins upplýsingar um sølu hjá stovnum landsins, tá Keyp landsins umbiður hesar.

## j. Samráðingar og sáttmáli

Vit ætlað ikki, at tað skal verða nakað samráðingarumfar. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella prís samráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum, har allar treytir í útbjóðingar tilfarinum eru við.

Keyp landsins kann tó samráðast við vinnandi veitaran um skifta ávísar vøru so tær hóska betur tørvin hjá Landssjúkrahúsinum og Glasir. Somuleiðis kann Keyp landsins samráðast um at fáa fleiri vørur við í rammusáttmálan – um Landssjúkrahúsið og Glasir umbiðja tað.

## I. Hagtøl

Veitari skal eftir hvønn ársfjórðing senda uppgerð til Glasir og Køkin á LS yvir keyp í farna ársfjórðinginum. Fyri LS skal hetta verða fyri Køkin og Kafé'ina hvør sær. Uppgerðirnar skulu vísa samlaðar nøgdir og upphæddir fyri vørur í ársfjórðinginum og samlað fyri árið higartil. Uppgerðirnar kunnu soleiðis brúkast sum ein ársuppgerð við árslok eisini. Uppgerðir skulu sendast í seinasta lagi hin 15. í mánaðinum eftir, at ársfjórðingur er endaður, t.v.s. hin 15. í apríl, juli, oktober og januar. Dømi um uppgerð skal við í tilboðið.

Somuleiðis hevur Keyp landsins tørv á at fáa upplýst árliga hvussu stór sparing er í mun til vanligan listaprís.

## k. Fyrivarni og minstukrøv

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaðir til at seta skrivligar spurningar, um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

Tilboðsgevarar kunnu ikki hava skuld til tað almenna, vísandi til galdandi reglur.

## l. Freist, ið tilboð skal standa við

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5. Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í samsvar við ásettu tillutanartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 6. Meting av tilboðum

Sáttmálin verður tillutaður í tráð við ásettu tillutanartreyt. Metingin av innkomnu tilboðum tekur støði í fylgjandi undir tillutanartreytum:

1. Prísur 80 %
2. Góðska 20%

Tann, sum bjóðar eina vøru, sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum hevur bíligasta samlaðan prís uppgjørdur har allir kostnaðir eru íroknaðir, fær fult stigatal. Dýrari vøra fær lutfalsliga færri stig.

Dømi
Ein veitari letur eitt tilboð inn við einum samlaðum kostnað á kr. 20.000 og annar veitari hevur eitt tilboð upp á kr. 30.000.

Bíligasti fær fult - 80%. Hin fær kr. (20.000/30.000)*80 =53,33 %

Í skjalinum: "Vøruyvirlit – Feskt kjøt" skal samlaða upphæddin upplýsast.

Tann sum fær rammusáttmálan, er tann, sum bjóðar eina vøru sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum hevur fær flest stig tá prísur og góðska er vektað.

Meginreglan er, at vit leggja okkum eftir at velja tann veitara sum hevur besta prís. Hinvegin, um tað vísir seg, at tað er lítil prís munur (t.e. 2%), og tað verður mett at verða fyrimunur at velja ikki tað bíligasta tilboð, so kann dómsnevndin taka avgerð um velja annað tilboð enn tað bíligasta. Dømi um tað kann verða, leveringstreytir, góðska á vøruni, vørumerki, sum hevur stórt álit ella líknandi.

## 7. Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Sáttmálin verður tillutaður, tá ið útbjóðari hevur valt tilboðið.

Útbjóðari er ikki bundin til at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær rættin til at strika útboðið.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari verður noyddur at strika útboðið.

| **Virksemi** | **Dato, klokkutíð** |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | hósdagin 5. mars kl 12.00 |
| **Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1.** | **Mikudagin 18. mars kl 12.00** |
| Væntandi tillutan av sáttmála | 27. mars |
| Væntandi undirskrift av sáttmála | 27. mars |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur av Rana
Fulltrúi